## Dýr fartelefon

Heimsins dýrasta fartelefon varð herfyri seld av felagnum, Goldvish, sum hoyrir heima í Geneve. Talan var um eina fartelefon úr 120 karat diamantum. Undir dýru kápuni var eitt 8X-zoom talgilt myndatól, 2 Gb minni, Bluetooth, MP3-spælari og útvarp. Prísurin – 1 millión evrur!

## Vandamikil teldu-battarí

Her fyri noyddist Dell at afturkalla eina rúgvu av battaríum til farteldur, tí hesi kundu hava ein framleiðslufeil, sum kundi seta eld á telduna. Nú hava framleiðarar hjá Sony staðfesta líknandi feil í teirra framleiðslu, og tað hevur fingið klokkurnar at ringja hjá Toshiba og Lenovo. Báðar fyritøkurnar hava afturkallað ávíkavist 500.000 og 830.000 teldubattarí. Hóast vandin verður mettur sum lítið ítøkiligur, hava seinastu hendingarnar fingið fleiri fløgfeløg at banna nýtslu av teldum, meðan flogið verður.




# 600 seyðir í heyst



*Alt er klárt í Oyrunum, og í dag verða fyrstu seyðirnir flettir hjá AG-Kjøti á Toftum*
Mynd: Vilmund Jacobsen



*Alberg Gaardlykke, slaktari, er maðurin aftanfyri AG-Kjøt. Her sker hann ein neytafjórðing sundur*
Mynd: Vilmund Jacobsen

in, og pláss er fyri umleið 60 seyðum í lastbilinum í senn. Beint við sláturhølini hevur felagið pláss fyri 150-160 seyðum, sum standa inni og bíða eftir slakti. Pláss er somuleiðis fyri eini 140 hangandi krovum. Er nógv fletting dag um dag, er neyðugt, at menn koma eftir krovunum stundisliga dagin eftir fletting.

- Hava vit einar 70-80 seyðir til fletting um morgunin, kunnu krovini heintast longu beint eftir døgurða sama dag.

Alberg Gaardlykke sigur, at teir, sum koma við nógvum seyði, eisini kunnu heinta krovini gjøgnum dagin, so hvørt sum flett verður.

- Soleiðis er vanligt, at bøndur, sum hava ein innilokaðan vøruvogn, kunnu taka eini 30 krov heim við sær í senn, sigur hann.

### Íliðin seyðaskinn

Í nøkur ár hevur AG-Kjøt eisini keypt "fesk" seyðaskinn, sum felagið hevur saltað og selt, men hetta fer felagið ikki at gera í heyst.

Í staðin fer AG-Kjøt seinni í heyst at keypa íliðin seyðaskinn, sum eru saltaði og viðfarin eftir forskriftunum.

– Vit fara at bjóða 14 krónur fyri skinnið, og ætlandi fara vit at taka ímóti síðstu viku í november ella fyrstu viku í desember.

Alberg Gaardlykke vísir á, at MBM seinastu árini hevur keypt íliðin seyðaskinn, men felagið hevur boðað frá, at tey ikki ætla sær at keypa í heyst.

– Eg havi fingið ein keypara í Póllandi, og eg ætli mær at royna hetta í heyst, sigur slaktarin.

### Sker neyt

Men fletting er ikki einasta virksemi, sum slaktarin á Nesi hevur av sínum slagi.

Í nøkur ár hevur hann eisini skorið neytafjórðingar sundur og pakkað fyri bøndur, og higartil í ár hevur hann soleiðis skorið og pakkað ikki færri enn 185 neyt – ella 740 fjórðingar.

Aftrat sær til hjálpar við neytunum hevur Alberg Gaardlykke ein mann og tvær ungar gentur, sum taka sær av pakkingini.

## Størstu yvirskotini

Størsti parturin av ársrokniskapunum hjá føroysku parta- og smápartafeløgunum er nú komin til Skráseting Føroya. Tí má roknast við, at talan er um á leið álítindi uppgerð, sum nú framgongur á *www.business-line.fo*, har roknskapirnir hjá øllum partafeløgum verða skrásettir.

Á heimasíðuni er eisini yvirlit, sum sýnir tey 25 virkini við størsta yvirskotinum í 2005. Ikki óvæntað eru tað virki av ávísum slag, sum seta sín dám á listan. Teir báðir stóru peningastovnarnir eru báðir ovastir, Føroya Tele er langt uppi á listanum, og síðani koma virkir, sum fyri nógv tað mesta hava røtur í tilfeingisvinnuni. Undantøkini eru tó Atlantic Airways og so holding-feløgini, P/F 14 (fyrrv. Tórshavnar Skipasmiðja), Sp/F 5. mai 1994 (fyrrv. hjá Gunleivi) og P/F 5 / P/F H.T. Holding (Havnar Timburhandil).

Topp-25 listin hjá Business-line fyri 2005 sær soleiðis út

| Nr | Virki | Úrslit (tkr.) |
|---|---|---|
| 1 | P/F Føroya Banki, Tórshavn | 128.908 |
| 2 | P/F Føroya Sparikassi, Tórshavn | 126.609 |
| 3 | P/F Tjaldur, Tórshavn | 74.449 |
| 4 | P/F Føroya Tele, Tórshavn | 50.147 |
| 5 | P/F Palli hjá Mariannu *), Klaksvík | 29.853 |
| 6 | P/F Christian í Grótinum, Klaksvík | 25.085 |
| 7 | P/F J.P.J. & Co., Klaksvík | 24.969 |
| 8 | Sp/f Framinvest, Toftir | 22.969 |
| 9 | P/F Vinnan, Gøtu | 22.849 |
| 10 | P/F Atlantic Airways, Sørvági | 20.734 |
| 11 | P/F Hvalnes, Klaksvík | 17.380 |
| 12 | P/F Føroya Shell, Tórshavn | 14.980 |
| 13 | P/F Krossbrekka, Gøtu | 13.411 |
| 14 | P/F 14, Tórshavn | 13.265 |
| 15 | P/F Luna, Gøtu | 13.122 |
| 16 | Alistøðin á Bakka, Glyvrar | 13.051 |
| 17 | Sp/f 5. mai 1994, Tórshavn | 12.379 |
| 18 | P/F 5, Tórshavn, ***) | 11.852 |
| 19 | P/F H.T. Holding, Tórshavn | 9.177 |
| 20 | P/F Varðin, Gøta | 8.802 |
| 21 | P/F Farcod, Argir | 8.740 |
| 22 | P/F Fútaklettur, Sandavági | 8.522 |
| 23 | P/F Enniberg, Tórshavn | 7.546 |
| 24 | P/F Vónin, Fuglafirði | 7.507 |
| 25 | Sp/f Selberg, Sørvági | 7.422 |

*) P/FChristian í Grótinum er dótturfelag hjá P/F Palli hjá Mariannu

**) P/F Hvalnes er dótturfelag hjá P/F Christian í Grótinum

***) P/F H.T. Holding eigur meirilutan av partabrøvunum í P/F 5.